LØGTINGSINS UMBOÐSMAÐUR

Tórshavn, tann 30. mars 2011
J.Nr.: 201000050 / 33
(at tilskila í svari)

**Álit**
viðvíkjandi klagu um vantandi innlit frá Mentamálaráðnum

Við skrivi, dagfest 3. mai 2010, hevur A sent umboðsmanninum eina klagu um vantandi innlit frá Mentamálaráðnum í tvey journalyvirlit og skjøl viðvíkjandi einum fundi á Vinnuháskúlanum í februar 2006.

Saman við klaguni vórðu send skjøl, sum partvís eru endurgivin undir málsgongdini.

## Málsgongd

Í sambandi við, at Mentamálaráðið hevði viðgjørt eina kæru um handfaringina hjá Vinnuháskúlanum av eini innlitsáheitan, gav Mentamálaráðið samstundis klagaranum innlit í eitt umbiðið notat. Skriv Mentamálaráðsins, dagfest 29. mars 2010, hesum viðvíkjandi var soljóðandi:

> "… Í kæruni vísa tygum á, at B, fulltrúi í Mentamálaráðnum, luttók á fundinum og tí biðja tygum um innlit í frásøgn ella notat, sum fulltrúin hevur skrivað frá fundinum. Mentamálaráðið hevur staðfest, at notat frá fundinum er skrásett í Mentamálaráðnum og avrit av notatinum er hjálagt hesum brævi. …"

Í teldubrævi 8. apríl 2010 sendi klagarin Mentamálaráðnum soljóðandi innlitsáheitan:

> "**Innlitsumbøn og kæruvegleiðing** (mál …)
> Biðið verður um innlit í fullfíggjaðan skjalalista í hesum málum:
>
> Skrátal …, máltal … og máltal …
>
> Biðið verður eisini um innlit í øll skjøl, sum hava samband við fundin á Vinnuháskúlanum tann 22. februar 2006, so sum fundarinnkalling til Mentamálaráðið, dagsskrá, viðgerð Mentamálaráðsins av "Uppskot um Útbúgvingarætlan fyri maskinmeistaraútbúgvingina, februar 2006 (og kladdu frá februar 2005)." og samskiftið millum Vinnuháskúlan og Mentamálaráðið/B annars í januar og februar 2006. …"

Í teldubrævi 22. apríl 2010 sendi klagarin Mentamálaráðnum soljóðandi áminning:
.
> "Enn er onki svar komið úr Mentamálaráðnum … Sum kunnugt sigur innlitslógin, at svarfreistin er 10 dagar. Eisini hevur ráðið skyldu sambært fyrisitingarlógini kap. 7 at vegleiða borgaran um kærumøguleikar og mannagongdir. Av tí at málið hevur skund, verður biðið um, at Mentamálaráðið avgreiðir málið á rættan hátt beinanvegin. ..."

Tann 26. apríl 2010 sendi Mentamálaráðið klagaranum soljóðandi svar uppá innlitsáheitanina:

> “**Viðvíkjandi umbøn um innlit og klaguvegleiðing**
> Í telduposti, dagfestur 8. apríl 2010, heita tygum á Mentamálaráðið um innlit í skjøl viðvíkjandi fundi á Vinnuháskúlanum 22. februar 2006.
>
> Tygum hava eisini í telduposti, dagfestur 1. mars 2010, kært Vinnuháskúlan til Mentamálaráðið í sambandi við umbøn um alment innlit í skjøl frá omanfyri nevnda fundi. Í sama telduposti heita tygum á Mentamálaráðið um innlit í skjøl frá Mentamálaráðnum frá sama fundi.
>
> Mentamálaráðið avgreiddi hetta mál við brævi, dagfest 29. mars 2010.
>
> Mentamálaráðið kann staðfesta, at ongi skjøl frá omanfyri nevnda fundi eru skrásett í Mentamálaráðnum, sum tygum ikki hava fingið innlit í. …”

## Partshoyring

Umboðsmaðurin gjørdi av at kanna hetta málið nærri, og við skrivi, dagfest 4. mai 2010, varð klagan send Mentamálaráðnum til ummælis við einari freist áljóðandi 3 vikur. Samstundis varð Mentamálaráðið biðið um at lata umboðsmanninum øll skjøl í málinum til láns.

Tann 19. mai 2010 sendi Mentamálaráðið umboðsmanninum soljóðandi viðmerkingar:

> “**Viðvíkjandi klagu frá A**
> Løgtingsins umboðsmaður hevur í brævi til Mentamálaráðið, dagfest 4. mai 2010, biðið um frágreiðing og skjøl í sambandi við klagu frá A, dagfest 3. mai 2010.
>
> A kærdi í telduposti til Mentamálaráðið, dagfestur 1. mars 2010, viðgerð Vinnuháskúlans av innlitsumbøn hansara um fundarfrásøgn frá fundi á Vinnuháskúlanum 22. februar 2006. Eisini biður A um innlit í frágreiðing ella notat frá omanfyri nevnda fundi, sum fulltrúi í Mentamálaráðnum hevði luttikið á.
>
> Fundurin 22. februar 2006 snúði seg um uppskot til nýggja útbúgvingar- og lesiætlan fyri maskinmeistaraútbúgvingina, og er tí skrásett í máli um bygnað fyri Vinnuháskúlan. Mentamálaráðið staðfesti, at eitt innanhýsis notat frá nevnda fundi var skrivað og avgjørt varð at geva A innlit í innanhýsis notatið frá fundinum. Mentamálaráðið kann eisini staðfesta, at ongi onnur skjøl viðvíkjandi fundinum á Vinnuháskúlanum tann 22. februar 2006, eru skrásett í Mentamálaráðnum.
>
> Mentamálaráðið avgreiddi hesa kæru og innlitsumbøn í brævi, dagfest 29. mars 2010.
>
> Í telduposti, dagfestur 8. apríl 2010, heitir A enn einaferð á Mentamálaráðið um innlit í skjøl frá fundinum á Vinnuháskúlanum 22. februar 2010.
>
> Mentamálaráðið avgreiddi hesa innlitisumbøn í brævi, dagfest 26. apríl 2010.
> …
> Mentamálaráðið hevur ikki aðrar viðmerkingar til hesi mál.”

Við skrivi, dagfest 27. mai 2010, vórðu viðmerkingarnar hjá Mentamálaráðnum sendar klagaranum til ummælis við einari freist áljóðandi 14 dagar.

Tann 7. juni 2010 sendi klagarin umboðsmanninum soljóðandi viðmerkingar:

> “**Svarskriv í máli 201000050, kæra frá A, dagfest 3. mai 2010**
> Kæra mín til Løgtingsins umboðsmann (LUM) snýr seg fyrst og fremst um at fáa innlit í tveir skjalalistar hjá Mentamálaráðnum (MMR).
>
> Í innlitsumbønini til MMR, dagfest 8. apríl 2010, skrivaði eg:
> ”Biðið verður um innlit í fullfíggjaðan skjalalista i hesum málum: Skrátal …, máltal … og máltal …”.
>
> MMR fer tilvitað uttanum kjarnan í málinum. Hvørki í innlitssvarinum til mín ella í svarskrivinum til LUM, dagfest 19. mai 2010, nevnir MMR hesar skjalalistar við einum orði.
> …”

Við skrivi, dagfest 8. juni 2010, vórðu viðmerkingarnar hjá klagaranum sendar Mentamálaráðnum til ummælis við einari freist áljóðandi 14 dagar.

Tann 15. og 29. juni 2010 sendu ávikavist Mentamálaráðið og klagarin umboðsmanninum viðmerkingar til málið, og hesar vórðu sendar ávikavist klagaranum og Mentamálaráðnum til ummælis. Viðmerkingarnar eru ikki tiknar við í álitið, tí tær verða ikki mettar at hava týdning fyri umboðsmansviðgerðina av klaguni. Av tí at umboðsmaðurin einki frætti aftur frá Mentamálaráðnum, boðaði hann pørtunum frá við skrivi, dagfest 31. august 2010, at umboðsmaðurin fór undir endaligu viðgerðina av málinum.

Tann 20. september 2010 viðmerkti umboðsmaðurin í skrivi til Mentamálaráðið, at ráðið ikki sást at hava tikið støðu til tann partin av innlitsáheitanini frá 8. apríl 2010, sum snúði seg um innlit í journalyvirlitini í tveimum nærri tilskilaðum málum, og at umboðsmaðurin ikki hevði móttikið journalyvirlitini. Umboðsmaðurin heitti á Mentamálaráðið um at greiða nærri frá viðgerðini av innlitsáheitanini í hesum sambandi og at senda umboðsmanninum skjølini.

Við skrivi, dagfest 30. september 2010, boðaði Mentamálaráðið umboðsmanninum frá, at ráðið hevði staðfest, at journalyvirlitini av misgávum ikki vóru send A, og at Mentamálaráðið harmaðist mistakið.

Í teldubrævi 3. november 2010 spurdi umboðsmaðurin Mentamálaráðið, um ráðið hevði givið klagaranum innlit í journalyvirlitini. Í teldubrævi 4. november 2010 boðaði Mentamálaráðið umboðsmanninum frá, at Mentamálaráðið fór at senda klagaranum skjølini sama dag. Í teldubrævi 8. november 2010 boðaði Mentamálaráðið umboðsmanninum frá, at "nevndu skjøl og skjalayvirlit" vóru send klagaranum sama dag.

27. november 2010 boðaði klagarin í teldubrævi umboðsmanninum frá, at hann hevði fingið innlit í journalyvirlitini, men gjørdi samstundis vart við, at hann ikki hevði fingið innlit í øll tey skjøl, sum hann upprunaliga hevði biðið um.

**Niðurstøða**

Hendan klagan snýr seg um, at klagarin í apríl 2010 bað Mentamálaráðið um innlit í journalyvirlitini í tveimum nærri tilskilaðum málum, umframt skjøl viðvíkjandi einum fundi á Vinnuháskúlanum í februar 2006.

Klagarin fekk innlit í eitt upprit fundinum viðvíkjandi, men sambært svarinum til klagaran tók Mentamálaráðið ikki støðu til tann partin av áheitanini, sum snúði seg um journalyvirlitini. Klagarin fekk ikki umbidnu skjalayvirlitini útflýggjað, fyrr enn umboðsmaðurin í november 2010 á øðrum sinni spurdi Mentamálaráðið um viðgerðina av hesum partinum av innlitsáheitanini.

Journalyvirlit yvir skjøl í einum máli eru beinleiðis fevnd av rættinum til innlit sambært § 5, stk. 1, nr. 2 í innlitslógini (løgtingslóg nr. 133 frá 10. juni 1993 um innlit í fyrisitingina, sum broytt við løgtingslóg nr. 76 frá 8. mai 2001). Innlit í journalyvirlitini eru ein trygd fyri, at skjøl ikki verða hildin uttanfyri, tá viðkomandi biður um innlit í skjølini í einum máli. Reglan í § 5, stk. 1, nr. 2 er tí av alstórum týdningi fyri at tryggja viðkomandi innlit í øll skjøl, sum eru fevnd av rættinum til innlit.

Í svari til umboðsmannin 30. september 2010 sigur Mentamálaráðið, at tað var av misgávum, at klagarin ikki hevði fingið journalyvirlitini sendandi. Havandi í huga at innlitsáheitanin var greið

og sambært lógini einføld at viðgera, umframt at klagarin undir umboðsmansviðgerðini endurtók innlitsáheitanina og tilskilaði, at hon fyrst og fremst snúði seg um innlit í tvey journalyvirlit, haldi eg tað vera átaluvert, at Mentamálaráðið ikki fyrr varnaðist, at hesin parturin av innlitsáheitanini var óviðgjørdur og tók neyðugu stigini til at viðgera áheitanina.

Eg fari eisini at átala, at Mentamálaráðið, hóast tað seinast í september 2010 varð varugt við, at klagarin ikki hevði fingið útflýggjað umbidnu skjølini, ikki sendi klagaranum journalyvirlitini, fyrr enn umboðsmaðurin í november 2010 spurdi, um hetta var gjørt.

Klagarin hevur undir partshoyringini gjørt vart við, at Mentamálaráðið ikki hevur útflýggjað øll skjølini, sum viðvíkja fundinum á Vinnuháskúlanum tann 22. februar 2006. Um hetta hevur Mentamálaráðið í skrivi til klagaran, dagfest 29. mars 2010, greitt frá, at tað í Mentamálaráðnum bert er skrásett tað eina skjalið, sum hevur tilknýti til nevnda fundin, og at klagarin hevur fingið eitt avrit av hesum útflýggjað. Rætturin til innlit fevnir sambært § 4, stk. 1, 1. pkt. í innlitslógini um skjøl, sum myndugleikin hevur móttikið ella gjørt sum liður í fyrisitingarligari saksviðgerð. Finnast umbiðin skjøl av eini ella aðrari orsøk ikki, eru eingi skjøl at fáa innlit í, og havi eg vísandi til frágreiðing Mentamálaráðsins um hesi viðurskifti ikki grundarlag fyri at gera meira við hendan spurningin.

Sum nevnt hevur klagarin fingið innlit í journalyvirlitini, og burtursæð frá omanfyri standandi átalum, geri eg ikki meira við málið.

Sólja í Ólavsstovu
Umboðsmaður